# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein depil tekur skap

Í gjár var skúladepilin í Hovi reistur. Við hesum er eitt týðandi kapittul av eini langari og til tíðir sera truplari skúlasøgu skrivað. Spurningurin um sømilig hølisviðurskifti hjá miðnámsskúlanum í Suðuroy er gamal og trupul. Í úti við fýratí ár hava næmingar og lærarar húsast undir trongum korum, sum hava sett mangan heilt órímilig krøv til allar partar. Tað byrjaði fyrst í sjeytiárunum undir sera truplum korum. Men tað gekk, tí lærararnir vóru eldsálir, ið høvdu ta trúgv uppá verkætlanina, sum skuldi til, og lokalsamfelagið, tey ungu, foreldrini og kommununar tóku væl ímóti tiltakinum. Men tey máttu sum vant, tá um Suðuroynna ræður, bíða, til tey norðanfjørðs høvdu fingið sítt. Hartil hevur skúlin havt ta syrgiligu lagnu at vera politisk kastibløka, sum so mangt í Føroyum. Í áravís var óvissa um staðsetingina, og stríð um henda spurning kundi eins væl havt forkomið hesi frálíku verkætlan. Endin gjørdist, at HF, sum Miðnámsskúlin, tá nevndist, varð fluttur til Vágs, har hann húsaðist í trongum korum. Tá so myndugleikarnir langt um leingi taka sær um reiggj undir fullveldislandsstýrinum at lata nýggjan skúla byggja í Vági, verður spakin settur í jørðina vesturi í Bø við stórfingið hátíðarhald og eftirfylgjandi stórari og lívligari veitslu. Einki løgið í tí, hetta var veruliga ein stórur dagur í Suðuroy.

Men sum best, meðan menn standa sveittan í barm vestur í Bø og grava út, sveiggjar, sum ikki einaferð, politiska pendulið í Føroyum. Nýggja landsstýrissamgongan vísir seg at hava aðra hugsan um skúlaskapin í Suðuroy, serstakliga við atliti at bygnaði og staðseting. Nú skal allur miðnámssektorurin samskipast og umskipast og í hesum høpi verður tað upplagt at leggja Almanna- og heilsuskúlan á Tøroyri saman við Miðnámsskúlanum í Vági. Í hesum høpi verður gamli skúlapakkin tikin framaftur undan væðingini í Tinganesi, og politisk avgerð verður skjótt tikin um at savna ta miðnámsundirvísing, sum er í oynni, í ein depil - í Hovi. Sum vera man elvdi henda avgerð til illstøðu, og mong kendu hetta sum eina løgna avgerð. Men avgerðin varð tikin, hon var lóglig, og mangt bendir á, at suðuroyingar hava góðtikið hana, um enn mong kanska serstakliga í sunnaru helvt hava gjørt hetta við ringum tannabiti. Nú er depilin so við at taka skap, reisigildið hevur verið. Karmarnir síggjast, og tey, sum hava gott skil á byggifrøði, siga, at verkætlanin er framúr og at bygningurin sjálvur verður ein arkitektonisk perla nakað sum Norðrulandahúsið og ellisheimið í Vágum. Sostatt er reisigildið bert at fegnast um, og vit ivast ikki í, at nýggi skúlin fer at verða til mikið gagn fyri Suðuroynna og allar Føroyar. Nýggi skúlin fer ivaleyst at gerast tann mentanar- og upplýsingarmiðadepilin, sum ikki bert verður eitt frálíkt og gott tilboð til ungdómin, men sum eisini fer at virka savnandi og mennandi fyri Suðuroynna sum heild.

**Sosialurin**

# Savna inn fyri Skálavík

NIELS J. ERLINGSSON

Fyrstu dagar februar bórust tey tíðindi higar til Ísland, at óðnarveður hevði gjørt stóran skaða við havnina í Skálavík, nakrar dagar seinni sóu vit myndir frá skaðatilburðinum sum vístu, hvussu brimið hevði brotið niður mannvirkir, havn, hús og bátar, fyri uttan kirkjugarðin sum stórur partur havði skola burt.

Vit hittust her tríggir menn. Eg sum føroyingur Niels J. Erlingsson, Árni Stefán Hilmarsson mikil føroyavinur við sterkun tilknýti við Føroyar, triðji maðurin er vinur okkara Fjalar Freyr Einarsson, áhugamaður um føroysk viðurskifti. Vit gjørdu av at fara avstað við innsavnan av peningi til at hjálpa hesari lítlu byggð sum so hart var rakt av óðnini, eisini hugsaðu vit at nú var komið til tað at íslendingar vildu vísa føroyskari byggð vinarhug fyri tann hug sum føroyingar vístu íslenskum bygðarløgum tá natúrkreftirnar vístu tennur sínar, eitt er tað sum takkavert er tá óðnin fór yvir Føroyar,at tað var ikki mannskaði.

**Innsavnanin fer avstað**

Áður enn innsavnanin fer avstað var haft samband við bløð, útvarp bæði ríkisútvarp, útvarpið á norðurlandinum (Akureyri) sendur var teldupóstur til feløg og stovnar og tey biðin um at geva til endamálið lýst var í útvarpi hvar fólk kundi leggja pening inn á konto í banka, allt sá so væl út og peningur fór at streyma inn, fyrsti peningur kom á kontoina 22. februar, og avgjørt varð at innsavningin skuldi standa til 14. mars.



**So gerist hetta ótrúliga**

26. og 27. februar kemur fram føroyskur tíðindamaður og ber tey boð ígjøgnum ríkuisútvarp og staðarútvarp, at hetta var so lítil skaði sum hendi í Skálavík, at tað var eingin grund til at fara avstað við innsavnan, bæði var skaðin lítil og so var hetta so væl trygt, vit sum stóðu fyri tiltakinum stóðu sum kánus fyrst, vistu ikki hvat í var á ferð, settu okkum í samband við tað fólk sum vit hildu helst mundi vita tað rætta. Sjálvandi raplaði niður innsavningin, vit royndu at senda út myndir frá skaðanum sum vístu, hvussu sá út á staðnum. MEN GAKK.

8. mars kemur sami tíðindamaður í ríkissjónvarpið fyllir út í skíggjan og heldur tað sama fram, at ongin grund til at samla inn fyri at hjálpa Skálavíkingum. Vit frættu frá Føroyum, at metingin av skaðanum vildi liggja fyri 14. mars, sama dag og innsamlingin endaði, vit kundu nú tá so var komið lítið gera annað enn at lata innsavningina standa við til 14. mars. Eg haldi tó, at nógv fólk hava sæð at okkurt var heilt galið við hesum tíðindafluttningi frá Føroyum, áhugavert hevði verið at vita, hvat tað var sum fekk mannin at gera hetta, onkur her spurdi um í Føroyum var hrepparígur (ósamd byggðarløg) Vit eru tó væl nøgdir við úrtøkuna av innsavningini og senda peningin við gleði til Skálavík.

**Skálavík og Sandoyggin**

Hóast røturnar hjá mær røkka aftur til Sands, har forfaðir mín Peter Hentze kom sum prestur 1783. Omma mín, móðir faðir mín Sofía Margreta dóttir Jóan Petur Hentze bónda í Uttastovugarði løgtingsmaður. Víða um Sandoynna voru ættingjar, hóast eg kendi ongan, eisini í Skálavík var skyldkona Marianna Jákupsdóttir úr Stovuni í skálavík. Giftist Jóhan Mikal Hentze sýslumanni í Sandoyar sýslu foreldrar at Jóan Peturi, víða um Sandaoynna vóru ættingjar sum gaman hevði verið at vita meira um.

**Peningurin sendur til Føroyar**

Tá tikið var saman tað sum samlaðist til endamálið royndist tað vera Ísl. Kr.3.535,800 sum samla var + vextir og eru vit glaðir yvir at kunna senda hvørt oyra til Skálavík, hóast ísl. krónan hevur verið í heldur fríun falli nú í seinstuni, vóna vit at peningurin kann nýtast sum lítil hjálp til at byggja upp aftur tað sum óðnin tók.

Ikki er gott at siga, hvussu stór peningagávan kundi verið sum send var til Føroyar, um ikki hendan óskiljanliga innblanding í arbeiði við at samla inn peningi til at hjálpa til við at byggja upp aftur tað sum óveðursóðnin breyt niður, hóast okkurt var tryggt var jú skaðin hin sami í peningavirði talið. Vit vilja bara biðja Guð at styrkja tykkum bæði í Skálavík og onnur, sum vóru fyri skaða í óveðrum teimum sum gingu yvir Føroyar.

Bestu heilsur frá okkum sum stóðu fyri innsamlingini.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.